# Skeivt at geva vitan burtur

**Vit eiga at selja okkara vitan heldur enn at lata aðrar fáa hana fyri einki, sigur stjórin á Skipasmiðjuni á Skála. Hann sipar til, at vit kunnu útflyta okkara vitan um skipasmíð fyri pengar**

SKIPASMÍÐ
*Edvard Joensen*

Føroyingar eru væl fyri, tá vit tosa um at smíða skip. Vit klára at útvikla øll skip minst líka væl sum aðrir, og tí eiga vit at fáa inntøku úr, sigur Jón Danielsen, stjori á Skipasmiðjuni á Skála.

Hann heldur tað vera púra skeivt at fara aðrastaðni við allari teirri vitan, føroyingar gjøgnum fleiri ættarlið hava bygt upp um, hvussu eitt fiskiskip roynist best.

Her hugsar hann um, at menn tosa um at fara út í heim at smíða skip. Biðið verður um eitt skip, og so verður sagt, hvussu vit vilja hava tað. Men tað er ikki altíð, at tann útlendska skipasmiðjan veit heilt nágreiniliga, hvussu allir partar um borð samstarva best.

– Tað vita vit hinvegin á føroysku skipasmiðjunum, sigur stjórin á Skipasmiðjuni á Skála. Hann vísir á, at júst skip, sum smíðað eru í Føroyum, hava víst seg at royndt mest effektiv undir Føroyum. Bæði til fiskiskap og ikki minst sum arbeiðspláss.

Føroyskir fiskimenn hava gjøgnum fleiri ættarlið útviklað hesi skipini og hava borið sínar royndir víðari. Hesum hava teir, sum teknað skip í Føroyum tikið við og hava gjørt skipini eftir hareftir Tey lúka tí tey krøv og ynski, fiskimaðurin setir til tey.


*Føroyingar klára minst líka væl sum aðrir at smíða okkara egnu skip, sigur Jón Danielsen, stjóri á Skipasmiðjuni á Skála*
Mynd: Edvard Joensen

Har flýtur alt saman í eina heild.

Mótvegis hesum hava vit skip, sum eru umbiðin uttanlands. Tey verða teknað og gjørd liðug av fólki, sum hava heilt aðrar traditiónir innan fiskiskap, enn vit hava.

Tað er rætt, ásannar Jón Danielsen, at vit hava avmarkaða nøgd av arbeiðsmegi til at gera alt tað, vit kundu hugsað okkum.

Men tað er heldur iki har vit skulu kappast, sigur hann. Tað er í lagi at lata aðrar gera eitt nú skrokkarnar, sum vit hava sæt tað við millum øðrum Teistanum.

Men tað, sum er áhugavert í hesum sambandinum er, at vit hava útviklað skip, sum vit saktans kundu selt uttanlands eisini. Vit skulu satsa upp á teir partarnar, sum ikki krevja so nóv fólk. Eina teknistovu, sum kann tekna skipið. Fáa spaniólar ella polakkar at sveisa. Gera liðugt heima hjá okkum sjálvum og so selja aftur.

Fyri ikki at tala um at gera okkara egnu skip. Føroyski fiskiflotin verður tvingaður til útskifting heilt skjótt. Og tað er ikki nóg gott, um alt hetta arbeiðið skal gerast uttanlands, tá vit saktans kunnu gera tað her hjá okkum sjálvum.

At tað er so nógv bíligari uttanlands, er hann ikki bara samdur í. Hann nevnir dømi, har skip er smíðað í Føroyum og klárar seg fínt, meðan onnur, av somu stødd, sum eru innflutt, eru farin av knóranum.

Kanska júst tí, at tey hava havt ábøtur fyri neyðini. Hava mist tíð, har tað føroyska hevur verið effektivari bæði til fiskiskap og landing.

Eitt nú nevnir hann eitt trolarapar, sum smíðað er her heima, sum siglir at kalla í pendulferð út og inn. Tað tekur onga tíð at landa og gera klárt og fáa tey tí fleiri dagar, enn onnur.

Júst her koma tær áralongu royndirnar, okkara fiskimenn hava savnað, til góðar, vísir Jón Danielsen, stjóri á Skipasmiðjuni á Skála, á.

# Teistin til tíðina

**Teistin verður liðugur til ásetta tíð. 17 mars fer hann royndartúr og 29. mars verður hann handaður Strandferðsluni, sigur stjórin á Skipasmiðjuni á Skála**

SKIPASMÍÐ
*Edvard Joensen*

Nýggja Sandoyarferjan, Teistin, verður latin Strandfaraskipum Landsins tann 29. mars, sigur Jón Danielsen, stjóri á Skipasmiðjuni á Skála.

Tað eru átta vikur síðan, Teistin kom á Skála. Og um átta vikur verður hann liðugur, sigur Jón Danielsen. Hann er sannførdur um, at tíð fer at halda.

Tað verður arbeitt dúgliga umborð á Teistanum. Eini 60-70 mans arbeiða tólv tímar dagliga upp á skipið. Hetta er ikki bara fólk frá skipasmiðjuni, men eisini undirveitarar, sum skipasmiðjan hevur fleiri av.

Arbeiðið gongur væl, og eitt nú eru skrúvurnar ísettar og forbundnar. Maskinurnar eru setir í, og lensiskipanin er liðug.

Til dømis ger Byggiservice á Skála alla apteringina umborð. El-Service ger tað elektriska og Oilwind í Miðvági ger hydraulikkin.

Í hesum sambandi nevnir Jón Danielsen, at Oilewind ger annað enn at installera hydraulikkin. Teir hava til dømis gjørt øll spølini sjálvir í Miðvági.

Demich í Havn hevur ventilatiónsarbeiðið umborð, og Radioservice í Havn fer at seta nautisku útgerðina í skipið.

Soleiðis gevur Teistin eina rúgvu av arbeiði, eisini aðrastaðni enn á Skála, vísir Jón Danielsen á.

Sjálv letur Skipasmiðjan eitt nú maskinur og skrúvugreiðir. Skrúvurnar á Teistanum eru nakað fyri seg. Tær virka ikki bara sum skrúvur, uttan eisini sum róður á skipinum. Teistin hevur nevniliga einki róður. Men skrúvurnar, sum eru tvær í tali, kunnu snarast 360 stig, og verða brúktar at stýra við. Eisini er Teistin útgjørdur við stórar bógskrúvu, sum hevur 850 HK. So um tað skuldi gjørst neyðugt, kann skipið sigla við síðuni til. Tríggjar høvuðsmaskinur eru, sum tilsamans hava eina megi upp á 1.700 HK.

Tað verður arbeitt allastaðni á skipinum samstundis. Teir skera og sveisa niðri í skipinum. Isolera í miðuni og seta plátur upp á brúnni.

Onkur heldur kanska, at skipið fer at sigla nógv skjótari enn Tróndur, Men so verður ikki, sigur Jon Danielsen. Tíðin um Skopunarfjørð verður tann sama sum nú. Tí Tróndur gongur í grundini rættiliga skjótt. Men munur verður á viðurskiftunum umborð, sigur hann. Tað verður sum dagur og nátt.

Tríggjar salongir verða umborð, og tær fara at kunna hýsa 330 ferðafólkum um summarið og nøkrum færri um veturin. Tvær eru á millumdekkinum allan veg fram við síðuni hvør sínu megin. Og ein er á ovara dekkinum undir brúnni. Lyfta er av bildekkinum og allan veg upp, so fólk, sum ikki eru so væl til beins, kunnu koma upp tann vegin.

Bildekkið verður eisini nógv størri, enn sandoyingar eru vanir við, sum er. Teistin kann taka 33 persónbilar ella 2 trailarar og 12 persónbilar. Skipið fer at hava hillar, sum verða loraðar niður á dekkið. Bilarnir verða koyrdir inn á tær, og so verður alt hivað uppaftur, áðrenn bilar síðan verða settir inn á sjálvt høvuðsdekkið. Tá trailarar eru við, fer ikki at bera til at brúka hillaranar.


*Joan Mikkelsen og Elinborg Joensen, høgrumegin, praktikantar á Sosialinum, tosa við Suna Justinussen, sum arbeiðir umborð á Teistanum*
Mynd: Edvard Joensen



# Brynja seg út til uppgávurnar

**– Tað er ein fortreyt fyri øllum uppgávum, vit skulu umsita, at neyðugur serkunnleiki er til staðar. Hóast kommunurnar í Norðoyggjum ikki eru lagdar saman, síggi eg allar Norðoyggjar sum eitt øki fyri at kunna útbyggja økið og seta fólk til uppgávurnar, sigur Eyðgunn Samuelsen, forkvinna í sosialu nevnd í Klaksvíkar býráð**

YVIRTØKA
*Turið Kjølbro*

– Størsta avbjóðingin komandi fýra árini meti eg vera, at almanna- og eldraøkið skulu leggjast út til kommunurnar at umsita, sigur Eyðgunn Samuelsen, forkvinna í sosialu nevnd í Klaksvíkar býráð.

Nýggja forkvinnan metir, at tað er ógvuliga umráðandi, at hesi øki verða løgd út, og at býtið av uppgávum millum land og kommunur yvirhøvur verður greiðari enn tað er í løtuni.

– Men peningur má sjálvsagt fylgja við. Vit síggja í fíggjarlógini fyri 2001, at kommunurnar nú skulu gjalda útreiðslunar sum landið higartil hevur borið av Nainu, fríplássum og øðrum, uttan at kommunurnar eru eftirspurdar. Soleiðis eiga yvirtøkurnar ikki at verða framdar, sigur Eyðgunn Samuelsen.


*- Vit eru nógv ímóti, at ein høvuðsbarnavernd verður í Havn, sum skal taka sær av teim tungu málunum. Tá er einki nærdemokrati og eingin serkunnleiki úti um landið, sigur Eyðgunn Samulsen, forkvinna í sosialu nevnd í Klaksvíkar býráð*
Mynd: Álvur Haraldsen

## Brynja seg út

Sosiala deild í Klaksvíkar býráð er munandi útbygd. Leiðari er settur seinasta heyst eins og samskipari, ið tekur sær av barnaansingarøkinum burturav.

– Deildin er útbygd við tí fyri eyga, at vit brynja okkum út at taka ímóti fleiri uppgávum á sosiala økinum. Hinvegin eigur landið ikki at kroysta uppgávur yvir okkum, uttan ávaring og uttan at pengar fylgja við. Politiskt er tað ógvuliga týdningarmikið, at serkunnleiki verður uppbygdur úti í økinum. Hóast kommunurnar í Norðoyggjum ikki eru lagdar saman, síggi eg allar Norðoyggjar sum eitt øki fyri at kunna útbyggja økið og seta fólk til uppgávurnar. Saknur hevur leingi verið á psykologi til barnaverndina og aðrar stovnar. Og eru allar Norðoyggjarnar ikki eitt stórt øki, er ikki orka til at seta nóg mikið av fólki. Eitt samstarv av einum ella øðrum slag má vera, har Klaksvíkin kann bjóða nakrar tænastur út til hinar kommunurnar í økinum. Eg ímyndi mær, at fáa vit fakfólk av ymiskum slagi, kunnu tey brúkast í einum breiðari høpi, til dømis á skúlunum. Tað loysir seg ikki í so máta at miðsavna alt í Havn, tí tað er ov langt burturi.

## Landið í sjey

Tað er ikki nærri viðgjørt í sosialu nevnd enn, men Eyðgunn Samuelsen metir, at útlit eru fyri, at lýst verður eftir psykologi skjótt. Rættiliga fitt av peningi verður á hvørjum ári brúkt til at keypa psykolog til ymsu málini.

– Barnaverndin hevur avgjørt tørv á psykologi, og tað loysir seg uppá allar mátar at hava ein psykolog í starvi burturav á staðnum. Tá eigur orka eisini at vera til fyribyrgandi arbeiði. Men áðrenn vit koma so langt, mugu vit fyrst vita, hvat hendir við barnaverndunum, sigur hon.

Her sipar hon til frágreiðingina, sum er gjørd um barnaverndirnar, har sagt verður, at ein høvuðsbarnavernd skal vera í Havn við neyðuga førleikanum til at taka sær av teim tungu málunum.

– Tað eru vit ógvuliga nógv ímóti. Tað er rætt, at barnaverndirnar eru ov smáar og ov nógvar. Ein gongd leið er, at landið verður býtt í sjey til dømis, har ein barnavernd er í hvørjum. Verður alt miðsavnað í Havn, er einki nærdemokrati og eingin serkunnleiki verður úti um landið. Í grundini er tað ein fortreyt fyri øllum øðrum uppgávum, vit skulu røkja og umsita, at neyðugur serkunnleiki er til staðar. Málið er at umsita so nógvar uppgávur sum til ber sjálv, og ikki minst, at uppgávubýtið verður væl greiðari enn tað er í dag. Barnaansingin er eitt gott dømi, sum vísir, at tað ber væl til at yvirtaka, sigur Eyðgunn Samuelsen.



## Ein grunn til allan arbeiðsmarknaðin

*Turið Kjølbro*

Í grein í týsdagsblaðnum um fyrstu viðgerð av lógaruppskotinum um nýggja barsilsskipan, varð Finnur Helmsdal, løgtingslimur fyri Tjóðveldisflokkin, siteraður fyri at hava sagt, at rættast hevði verið, at verandi barsilsgrunnur verður varðveittur, meðan ein annar verður stovnaður fyri restina av arbeiðsmarknaðinum. Hetta er ikki rætt.

- Tá eg í framsøgurøðuni nevndi, at tveir grunnar skulu stovnar heldur enn ein, var tí eg siteraði endan á notati, har Tummas Magnussen skjýtur upp, at av tí, at so nógv hesum víðvíkjandi er ógreitt ella fløkt hjá tí almenna, nevnir hann møguleikan at varðveita almenna grunnin og at seta annan grunn á stovn, sum skal vera fyri restina av arbeiðsmarknaðinum, sigur Finnur Helmsdal.

Í sambandi við, at landsstýrið legið málið um barsilsgrunn fram, hevur nógv tos verið um eitt ávíst notat frá 28.11.2000, sum Tummas Magnussen, stjóri á Lønardeildini í Fíggjarmálastýrinum hevur skrivað. Fyrsta gloymdi landsstýrið at senda tinginum notatið, síðani fekk tað fylgju av einum øðrum notati úr sama stýri, sum varð skrivað júst ein mánað seinni.

– Og sama hvat Tummas Magnussen ella onnur í Fíggjarmálastýrinum halda um tey 0,8 prosentini, kann notatið frá 28.11. væl og viðiliga tulkast sum at fakfeløgini hava rætt, sigur Finnur Helmsdal.

Vit biðja Finn Helmsdal og lesarar okkara halda okkum til góðar fyri mistakið.